SERNÁMSDEPILIN

## Ráðgevandi ergo-/ ella fysioterapeutur

Vegna farloyvi er eitt ¾ tíðar avloysarastarv í Sernámsdeplinum leyst at søkja.

**Tíðarskeið**
Frá 1. august 2008 og árið at enda. Tó kunnu umstøður koma, ið gera, at farloyvistíðin møguliga kann verða longd til 30. juni 2009.

**Arbeiðsstað**
Setanin er í Sernámsdeplinum í Tórshavn, men er arbeiðsøkið kanning og ráðgeving viðv. børnum og ungum ( 0-18 ár ) kring alt landið.

**Uppgávur**
Høvuðsuppgávan er í greiningararbeiði at skipa fyri rørsluligum kanningum av børnum og at luttaka í eygleiðing av børnum, ið eru undir kanning. At veita ráðgeving til stovnar, foreldur og tey, ið annars eru um børnini, ið hava rørsluligar - og sansaskipanar trupulleikar. Ein minni partur kann vera viðgerandi venjing. Arbeitt verður í samstarvi við HTM og Barnadeildina á LSH.

**Førleikakrav**
Útbúgvin ergo- ella fysioterapeutur. Fyrimun hevur umsøkjari við eftirútbúgving og/ ella royndum at kanna smábørn við serligum atliti til sansamenning.

**Løn og arbeiðstíð**
Eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag. Arbeiðstíð, frítíð o.a. verður løgd til rættis í samráð við stjóran í Sernámsdeplinum.

Meira fæst at vita við at venda sær til Guðrun Guðjónsson, ráðg. ergoterapeut - Helle Drews, ráðg. fysioterapeut ella Hans Eli Dahl, stjóra – Sernámsdepilin tlf. 314522
( kl. 10 – 12 )

Umsókn við avriti av próvskjølum og møg. m. skal vera Sernámsdeplinum í hendi í seinasta lagi tann 17. juli 2008.

**Sernámsdepilin**
Frælsið 32 – Postrúm 2036 – FO 165 Argir
Tlf. 314522 – Fax 310196
E – postur: sernamsdepilin@snd.fo



## Volvo S40 til sølu

Sera væl hildin ikki-roykjara bilur. 1.8 bensin við 125 hk. Árg. 10/2005, koyrt 28.000 km. Hevur ljósagrá leðursetur, leður róður, leður gearknobb v/alu, alupanelir, el-spegl, orig. 17" alu-felgur, niðurbl. spegl v/kompass, klimaanlegg, innbygd barnasetur o.m.a.

**Verður nú seldur fyri einans 239.000**

**Tel 21 19 96 ella kho@post.olivant.fo**

**Suðuroyar Sjúkrahús**
FO-800 Tvøroyri
Tlf: 34 33 00 · Fax: 37 11 42
E-mail: ssh@ssh.fo

## Goymslufólk

Eitt hálvtíðarstarv sum starvsfólk í goymsluni er leyst til setan skjótast møguligt.

**Starvið umfatar m.a.:**
- innkeyp av nýtsluvørum
- útflýggjan av vørum til deildir, stovnar og privatfólk.
- samstarv við seljarar
- uppfylling av vørum eftir ynski frá starvsfólkum á deildunum
- aðrar praktiskar uppgávur á goymsluni.

**Vit vænta at viðkomandi:**
- er opin fyri at nema sær kunnleika um ymsu vørurnar við t.d. at fara á neyðug skeið
- kann undirvísa starvsfólkum um nýtslu av vørum
- hevur góð samstarvsevnir
- er fyrikomandi
- hevur teldukunnleika á brúkarastøði
- hevur útbúgving sum sjúkrahjálpari/ sjúkrarøktarfrøðingur ella líknandi.

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Thyru Thorsteinsson fyristøðukvinnu tlf 34 33 00 lokal 3215.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:

Suðuroyar Sjúkrahús
att. umsjónarmaðurin
Sjúkrahúsbrekkan 19
800 Tvøroyri

ella

ssh@ssh.fo

**Umsóknarfreist 15. juli 2008.**



## 10-mannafar til sølu

Eitt lítið 10-mannafar úr træ til sølu. Báturin er bygdur í 1988 í Miðvági. Hann hevur 30 hestar Solé, Radar, ekkolod, vhf og NMT telefon. Snellur, fiskiloyvi v.m.

**SERA væl røktur bátur !!!**

**– Vælkomin at geva eitt boð**

**Tlf. 36 15 02 / 50 60 24**

VESTMANNA KOMMUNA

## VESTMANNA KOMMUNA

Bakkavegur 16 | Postboks 91 | 350 Vestmanna

## PEDAGOGUR TIL ÚTIBARNAGARÐIN LÁTIPÍPUNA

Søkt verður eftir einum pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna, har høvuðsuppgávan er at vera stuðul hjá einum barni við serligum tørvi.

Tað er stovnurin, sum setur stuðulin, sum verður partur av tí dagliga arbeiðinum á stovninum, umframt at verða ein partur av starvsfólkabólkinum.

Um eingin pedagogur søkir, verður fólk við øðrum førleikum sett í starvið.

Starvið er í fyrsta umfari tíðaravmarkað í 6 mánaðar frá 11. august 2008 at rokna.

**Vit kunnu bjóða:**
- Ein grønan stovn í náttúruumhvørvi við góðum møguleikum fyri túrum í á, haga og fjørðu
- Ein stovn, har dentur verður lagdur á alla tíðina at menna arbeiðið við børnunum
- Ein stovn í menning, har øll hava møguleik fyri at seta síni fingramerki
- Eitt arbeiðsumhvørvi, har dentur verður lagdur á greitt samskifti á øllum økjum
- Ein starvsfólkabólk, sum er opin fyri nýggjum avbjóðingum

**Vit vænta av tær, at:**
- Tær dámar at arbeiða við og vera saman við børnum
- Tú ert áhugað/-ur í tí menning, sum er neyðug í arbeiðinum við børnum
- Tú kanst arbeiða sjálvstøðugt
- Tú hevur góð samstarvsevnir
- Tú saman við hinum starvsfólkunum tekur ábyrd av at tryggja eitt greitt og jaligt samskifti á stovninum, umframt í øllum førum at søkja semjur.

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Løn sambart sáttmála millum Føroya Pedagogfelag, Fíggjarmálaráðið og Kommunala arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til

Einu Andreasen, leiðara, á tlf 230145.

Skrivlig umsókn skal verða Vestmanna Kommunu í hendi í seinasta lagi mikudagin 2. juli 2008 kl. 16.

**Látipípan** er ein stovnur við útibarnagarði, sum er eitt tilboð til 5-7 ára gomul børn, umframt frítíðarstovu til børn í 1. og 2. flokki.

veitst tú ikki tað?
Sosialurin